LM-025/2020

3

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR

Tórshavn, 6. juli 2020

Hoyringsskriv viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vilja hervið takka fyri høvið at koma við viðmerkingum til nærverandi uppskot um løgtingslóg.

Yvirskipað taka vit undir við løgtingslógini, sum hon er orðað. Tó vilja vit viðmerkja summar av orðingunum. T.d. stendur soleiðis:

> § 2. Kommunulækni kann ávísa til ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð sambært § 1 hjá sálarfrøðingi, sum virkar sambært sáttmála við Heilsutrygd.

Sum tað stendur aðrastaðni í uppskotinum, er ætlanin at seta í verk eina skipan, sum gevur lætta og skjóta atgongd til viðgerð. Sum tað eisini varð viðgjørt í arbeiðsbólkinum, ið gjørdi tilmælið, er ikki víst, at tað er lættast og skilabest at lata kommunulæknan vera inngongdina til nýggju skipanina, tí tað fer við eyka tíð og umsiting.

Í § 2 stendur eisini, at sálarfrøðingurin skal virka eftir sáttmála við Heilsutrygd. Aftur her verður lagt upp til somu skipan, sum vit frammanundan kenna. Her hugsa vit, at tað er meiri umráðandi, at sálarfrøðingarnir lúka somu *treytir* sum teir, ið hava sáttmála við Heilsutrygd, uttan at teir neyðturviliga eru teir somu, sum nú hava sáttmála við Heilsutrygd. Eitt nú er ein treyt, at sálarfrøðingarnir hava løggilding. Vit meta tað vera umráðandi, at løgtingslógin ikki læsir skipanina, tí hetta er hóast alt ein royndarverkætlan, har endamálið eisini er at finna útav, hvussu tað á ein smidligan hátt fyri borgaran verður skipað.

Á s. 10 í uppskotinum stendur soleiðis:

> Sálarfrøðingurin velur sjálvur sína tilgongd í mun til viðgerðarhætt, men tað er ein treyt, at hátturin er "bona fide"; tvs, at hann er ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar- í hesum føri angist og lætt til moderat tunglyndi, og at sálarfrøðingurin hevur teir neyðugu førleikarnar og útbúgvingarstig.

Her vilja vit skjóta upp hesa orðing:

> Sálarfrøðingurin velur sjálvur sína tilgongd í mun til viðgerðarhætt, men tað er ein treyt, at hátturin er "bona fide"; tvs, at hann er ætlaður at viðgera ávísar sálarligar trupulleikar- í hesum føri angist og lætt til moderat tunglyndi.

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR

Í tilmælinum er staðfest, at sálarfrøðingarnir eiga at hava løggilding, og tá meta vit, at man hevur neyðugu førleikar og útbúgving. Á s. 8 í tilmælinum stendur soleiðis, ið eisini er grundarlag fyri okkara viðmerkingum viðvíkjandi § 2:

> Sálarfrøðingarnir í skipanini hava løggilding frá Psykologinævnet. Sálarfrøðingar uttan løggilding kunnu gerast partur av skipanini í tøttum samstarvi við løggildan sálarfrøðing. Um tørvurin á viðgerð vísir seg at verða størri enn løggildu sálarfrøðingarnir í skipanini megna at viðgera, verða fleiri sálafrøðingar uttan løggilding settir í skipanina, við tí endamáli at fáa teimum løggilding.

Vinarliga

Nevndin hjá felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar

LM-025/2020

FØROYSKIR SÁLARFRØÐINGAR

Tórshavn, 6. juli 2020

Hoyringsskriv viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um royndarskipan um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð

Eyka viðmerkingar

Vit senda hervið nakrar eyka viðmerkingar til lógaruppskotið. Vónandi kemur tað við í viðgerðina.

Vit harmast um, at uppskotið ikki gongur longur niður í aldur enn 15 ár. Serliga í mun til ótta, sum hjá teimum allarflestu byrjar í barnaárunum. Viðgerð í barna- og ungdómsárunum kann fyribyrgja tilburðum av bæði ótta og tunglyndi seinni, og tí er harmiligt, at man ikki tekur hesa vitan við í skipanina. Tey børn og ungu sum hava ótta/tunglyndi í lættan/moderatan mun, hava ikki nakað ókeypis tilboð, sum støðan er í dag. Sernám veitir ikki viðgerð, psykiatriin tekur bara tey tyngstu málini, aloftast við komorbiditeti, og Barnaverndartænasturnar fevna bara um ein ávísan bólk.

Sostatt eru nógv børn og ung sum ikki eru fevnd av núverandi skipanum og tilboðum, um ikki familjurnar hava ráð at gjalda fyri tað. Vildi man veruliga hugsað fyribyrgjandi, átti skipanin at loyvt børnum yngri enn 15 ár eisini at fáa viðgerð.

Vinarliga

Nevndin hjá felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar